Heilsufrøðiliga Starvsstovan

Falkavegur 6, 2. hædd
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands
Tel. +298 35 64 00
Fax. +298 35 64 01
E-mail: hfs@hfs.fo
www.hfs.fo

FOOD, VETERINARY AND ENVIROMENTAL AGENCY

# Matvørudeildin lýsir eftir djóralækna

Søkt verður eftir djóralækna til matvørudeildina.

**Arbeiðsuppgávur**
Starvið fevnir um allar veterinerar uppgávur á matvørudeildini, so sum:
- Eftirlitið við innflutningi av matvørum úr djórum og fiski, bæði innflutningi av matvørum úr triðja londum (um marknaeftirlitsstøðir-nar) og innflutningi úr samhand-ilslondum.
- Málsviðgerð av og eftirlit við virkjum, sum framleiða animalskar non-food vørur, t.d. fiskamjølsvirki.
- Alment kjøteftirlit, tá ið kunngerðir koma á økinum.
- Luttøku í veterineru vaktarskip-anini á stovninum umfatandi alt tað veterinera øki.

Umframt veterineru uppgávurnar kemur djóralæknin at luttaka í øðrum virksemi á matvørudeildini, so sum:
- Góðkenning av og eftirlit við matvøruvirkjum (íalt er talan um eini 600 góðkenningareindir).
- Málsviðgerð í sambandi við góðkenning av innaneftirlits-skipanum.
- Fakligur ráðgevi í kunngerðar-arbeiði.
- Yvirvøku- og annað eftirlitsarbeiði.

**Útbúgving**
Tú skalt vera útbúgving djóralækni / veterinerur frá einum av norðurlon-dunum, ella hava eina veterinerút-búgving, sum samsvarar við hesar og sum ger, at tú kann løggildast í Føroyum til embætisdjóralækna.

Umsøkjarar við viðkomandi starvs-royndum hava fyrimun.

Vit sóknast eftir fólki við áræði og framfýsni at náa settum málum, og sum:
- Megnar at vísa og fasthalda yvirlit í eftirlitsarbeiðinum, og tá ið á leikar.
- Sær nýggjar arbeiðsuppgávur sum eina spennandi avbjóðing.
- Kann arbeiða sjálvstøðugt, men samstundis verða liðleikari.
- Dugir væl at samstarva.
- Hevur góð evni at samskifta við onnur, bæði í skrift og í talu.
- Hevur koyrikort til bil.
- Hevur kunnleika til framkomnar edv skipanir.

**Vit bjóða**
- Spennandi og sjálvstøðugt arbeiði á eini deild við engageraðum starvsfólki í einum tvørfakligum arbeiðsumhvørvi.
- Eitt arbeiði í samstarvi við vinnuna og aðrar myndugleikar.
- Nýggjar avbjóðingar.
- Støðuga førleikamenning.

**Tíð og setanarviðurskifti**
Starvið er fulltíðarstarv. Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Magistarafelagið við viðbót á 13. stigi, sí www.lnd.fo. Umsøkjarar við serligum førleika, eitt nú viðkomandi Phd stigi, hava møguleika fyri viðbót á 20. stigi.

Umsóknir við avriti av prógvi, CV, viðmælum o.t. skulu verða Heilsu-frøðiligu starvsstovuni í hendi í seinasta lagi **mánadagin 8. januar 2007.**

**Stutt um matvørudeildina**
Á matvørudeildini starvast íalt 10 fólk.

**Deildin tekur sær av:**
- Góðkenning av og eftirlit við matvøruvirkjum, (íalt er talan um eini 600 góðkenningareindir).
- Inn- og útflutningi av matvørum.
- Kunngerðararbeiði.
- Yvirvøku- og annað eftirlitsarbeiði.
- Veterinerar uppgávur, við atliti at djóraúrdráttum, íroknað non-food framleiðslur.

Lýsingin er eisini at síggja á heima-síðuni hjá Heilsufrøðiligu starvs-stovuni, www.hfs.fo.

*Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Óluvu Niclasen, deildarleiðara, tel. 356433.*




VAGLIÐ · FO-100 TÓRSHAVN · TEL 31 93 21 · FAX 31 93 31




www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo